# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Svanur framúr undirtøku



Nýggja ítróttarfelagið fyri brekað í Eysturoynni, Svanur, fekk eina góða byrjan, tá ikki færri enn 60 fólk møttu á stovnandi aðalfundinum í gjárkvøldið

Mynd: Rúna Feilberg Lamhauge

Soleiðis sær búmerkið hjá Svani út. Sjúrður Højgaard á Krea hevur teknað tað, og tað var Asbjørn Ejdesgaard, sum á stovnandi aðalfundinum fekk heiðurin at avdúka tað

**Stigtakararnir til nýggja ítróttarfelagið fyri brekað í Eysturoynni, Svanur, vóru ovfarnir av undirtøkuni á stovnandi aðalfundinum**

ÍTRÓTTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Í gjárkvøldið var føroysk ítróttarsøga skrivað í skúlanum við Løkin í Runavík, sum var karmur um stovnandi aðalfundin av nýggja ítróttarfelagnum fyri brekað í Eysturoynni, sum hevur fingið navnið Svanur.

Og sigast má, at undirtøkan fyri felagnum longu frá byrjan er stór, tí ikki færri enn 60 fólk møttu á stovnandi aðalfundinum, og tað vóru stigtakararnir sera bilsnir av:

– Eg hevði als ikki væntað, at undirtøkan fór at vera so góð. Hetta var ein sera hugnaligur fundur og fólk vóru sera jalig. Talan var um fólk í øllum aldri og úr allari oynni, so vit hava fingið ta best hugsandi byrjanina, sigur Dan Lamhauge, sum er ein av stigtakarunum til nýggja ítróttarfelagið.

Á fundinum var ein nevnd vald at stjórna Svani, og í henni sita Marjun í Jákupsstovu á Eiði, Hendrik Olsen í Lamba, Rodmund Nielsen á Glyvrum, Eyðna Norðfoss í Runavík og Hugo Leo í Leirvík. Onkur teirra er burturstaddur, so væntandi fer nevndin at skipa seg í næstu viku.

Umframt at alt tað formliga, ið hoyrir til ein stovnandi aðalfund, skuldi fáast frá hondini, var eisini eitt búmerki avdúkað. Asbjørn Ejdesgaard trýsti á knøttin, sum fekk tað at koma fram á skíggjanum. Tað er Sjúrður Højgaard á Krea, ið hevur teknað búmerkið hjá Svani.

## Heilsan til Svan

Longu áðrenn nýggja ítróttarfelagið fyri brekað í Eysturoynni var sett á stovn í gjárkvøldið, hevði Ráðið fyri Brekað almannakunngjørt eina heilsan til felagið, har ráðið fegnast um, at ítróttarfelag fyri fólk ið bera brek, verður stovnað undir ÍSB.

– Nú Heilsumálaráðið hevur lýst ár 2009 at vera rørsluár, er hugaligt at síggja at ítrótturin, sum er fyri fólk, ið bera brek, økir um sítt virksemi. Tað er av alstórum týdningi, at fólk, ið bera brek, fáa møguleika at luttaka í ítrótti eins og øll onnur, stendur í heilsanini frá Ráðnum fyri Brekað.

– Umframt endamálið við ítróttinum, eru nógvir aðrir fyrimunir, eitt nú at fáa vinir, kenna samanhald og stuttleika. Harumframt er tað umráðandi, at fólk ið bera brek, fáa høvið at njóta teir møguleikar, sum lívið bjóðar, á jøvnum føti við onnur.

Ráðið fyri Brekað sigur í heilsanini, at tað helst fer at síggjast aftur í teimum kappingum, Føroyar eru við í, at lokalfelag undir ÍSB nú er stovnað í Eysturoynni.

– Gjøgnum tíðirnar hava vit sæð nógvir ítróttarúrmælingar, sum koma fra ítróttarfeløgum fyri brekað. Altjóða samstarv eigur eisini at røkka teimum, ið bera brek, sigur Ráðið fyri Brekað, sum eisini ynskti fyrireikarunum góða eydnu við stovnandi aðalfundinum.

# Kunna um Special Olympics Føroyar

**Seinnapartin í morgin hava ÍSB og Javni almennan kunningarfund um Special Olympics í Miðlahúsinum**

ÍTRÓTTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

ÍSB, sum umboðar allan ítrótt fyri brekað í Føroyum, er limur í alheims felagsskapinum Special Olympics undir heitinum Special Olympics Føroyar, sum so aftur er ein grein ella deild undir ÍSB.

Tey flestu munnu hava hoyrt um Special Olympics, tá okkara frægu ÍSB-ítróttarfólk hava verið við til olympisku leikirnar fyri brekað, tí har eru mangan komin góð úrslit og heiðursmerki burturúr. Tó vita kanska mong kortini ikki, hvat Special Olympics ítøkiliga stendur fyri, og tí verður nú skipað fyri kunningarfundi.

Tað er ÍSB, sum í samstarvi við Javna, hevur tikið stig til fundin, sum verður í Miðlahúsinum í morgin klokkan 15, og har fer at verða greitt frá, hvat Specials Olympics er og hvørjir møguleikar, ið har eru.

## Brúk fyri fólki

Stigtakararnir til fundin í morgin siga, at Special Olympics Føroyar hevur fyri neyðini at vera sera væl skipað og manna við fólki, sum brenna fyri arbeiðinum innan ítrótt fyri fólk við menningartarni, tí bert á tann hátt ber til at røkka longur á leiðini innan altjóða felagsskapin.

– Hetta krevur, at væl verður tikið undir við Special Olympics Føroyar, ikki bert av ítróttafólkunum, men eisini av teimum avvarðandi og av myndugleikunum, verður sagt á heimasíðuni hjá ÍSB.

– Við einum vælskipaðum felagsskapi verða tey avvarðandi ein størri partur í dagliga ítróttarlívinum hjá tí einstaka við menningartarni.

# Fjalla-súkkling í Havn í morgin

**Tórshavnar Súkklufelag hevur kapping í fjallasúkkling fyri unglingar og vaksin í Marknagili og Havnardali**

SÚKKLING
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Kappingin byrjar í morgin á miðdegi, og teir meira royndu súkklararnir hjá bæði unglingum og vaksnum skulu súkkla tilsamans 24 kilometrar, sum eru á økinum við ríðibreytina í Marknagili og eftir gøtunum út í Havnardal.

Tórshavnar Súkklufelag sigur, at onnur eisini fáa høvi at royna seg í fjallasúkklingini, men at tey skulu súkkla ein styttri tein, sum er seks kilometrar. Tey, ið hava hug til tað, skulu bara møta upp á parkeringsøkinum við ríðibreytina í seinasta lagi klokkan 11.30.

Hetta er onnur kappingin í fjallsúkkling, sum er í ár. Fyrru ferðina var súkklað á økinum kring Studentaskúlan í Hoydølum, og ta ferðina vóru bæði børn, unglingar og vaksin við.